Bárður á Steig Nielsen
Erhard Joensen
Helgi Abrahamsen
Johan Dahl
løgtingsmenn

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 100/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina (Víðkaðar heimildir at áseta reglur um avmarkandi tiltøk)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 1, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"Stk. 2. Tiltøk sbrt. §1 kunnu setast í verk, tó skal landsstýrismaðurin fáa heimild í serstakari løgtingslóg, um fiskivinnuavtalur við onnur lond ella avtalur um útflutning av fiskavørum og matvørum verða avmarkað."

Viðmerkingar:
Stk. 2 verður orðað av nýggjum.
Tað verður heimilað at seta tiltøk í verk sbrt. § 1 í løgtingslóg nr. 90 frá 17. mai 2022, um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina. Men ætlar landsstýrismaðurin ella landsstýrið at seta í verk átøk, ið avmarka fiskivinnuavtalur við onnur lond ella avmarka avtalur um útflutning av fiskavørum og matvørum, kunnu hesi átøk ikki setast í verk uttan við heimild í serstakari løgtingslóg.

Á Løgtingi, 16. juni 2023

Bárður á Steig Nielsen Erhard Joensen

Helgi Abrahamsen Johan Dahl